# Útfyllingin við Sandin skal hækkast

**Ein flati upp á 20.000 fermetrar er nú útfyltur við Sandin í Klaksvík. Fyllast skal ikki longur úteftir, men nú skal eitt lag afturat leggjast omanyvir. Hetta fyri at setningurin skal vera so effektivur, sum gjørligt, verður sagt**

ÚTFYLLING
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Útfyllingin við Sandin gongur við fúkandi ferð. Nú eru teir farnir í holt við at leggja næsta lagið oman yvir tað, sum er komið. Sum skilst skal flatin vera so høgur, sum tvørtræið á myndini vísir*

**Klaksvík:**
Tað hevur gingið við rúkandi ferð at fylla út við Sandin. Flatin, sum nú er fyltur út, er heilar 20.000 fermetrar, men nú verður hann ikki størri. Hann skal gerast munandi hægri enn hann er í verandi stund, og tað eru teir farnir í holt við nú.

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sigur, at løgini verða løgd á í tveimum fyri at setningurin skal ganga skjótari.

– Hetta valdu vit at gera, tí um nakað skal byggjast á, so er ikki so long tíð frá, at útfyllingin er liðug til tað arbeiðið kann fara ígongd, sigur borgarstjórin.

Longi ljóðaði, at ætlanin var at byggja eina handilsmiðstøð við Sandin. Men tær ætlaninar koyra, sambært Steinbjørn Jacobsen, við lágum blussi fyri tíðina. Stigtakararnir hava sum skilst rent seg í fíggingartrupulleikar, men borgarstjórin veit at siga, at teir framvegis arbeiða við tí. Teir hava biðið um fund við býráðið í hesu vikuni, men borgastjórin visti ikki, hvat tað er um.

Útfylti flatin er sum sagt 20.000 fermetrar, men ein stórur partur av honum, er ætlað til arbeiðspláss, og tað skal takast uppaftur, tá ein møgulig bygging er farin fram á økinum. Men sum sagt er ikki nógv, sum bendir á, at ein handilsmiðstøð verður bygd við Sandin í bræði.

### Aðrar útfyllingar

Umframt útfyllingina við Sandin hevur Klaksvíkar kommuna eisini fylt út á Norðborg. Har er liðugt, meðan útfyllingin í Ánunum gongur við fullari ferð. Til tað arbeiðið verður grót, sum kemur úr Norðoyatunlinum Leirvíkarmegin nýtt.

Steinbjørn sigur, at kommunan hevur umhugsað at fylla út norðan fyri Kósakaiina eisini.

– Ætlanin er at gera betri arbeiðspláss har, sigur borgarstjórin, sum ikki væntar, at kommunan fer at hava nakrar trupulleikar við at sleppa av við alt grótið, sum hon hevur keypt, úr Norðoyatunlinum.



# Ger títt besta

Nú veturin nærkast eru nógv frítíðarítriv farin í gongd aftur. Tað eru skótaliðið Nólsoyar Páls eisini.

Fastur úlvafundur er hvønn mikudag klokkan 16.30 til 18.00 í Uppistovu. Og skótafundurin er hóskvøld frá klokkan 19.30 til 21.00.

Skótarnir arbeiða eftir einum bóklingi, sum eitur Lítli Varði. Málið fyri úlvaungarnar, sum eru teir yngstu skótarnir, er, at tey skulu arbeiða fram ímóti at vita, hvussu ein úlvaflokkur er samansettur.

Tey skulu vita hvørjar uppgávur ein floks-og deildarleiðari hevur, og kenna úlvabúnan og vita, hvar tey ymisku merkini skulu vera.

Baden Powell, sum stovnaði skótarørsluna, segði einaferð í einari røðu, at flestu øll, sum ganga í einum búna, hava eina uppgávu at røkja. Løgreglumaðurin og læknin gera sítt besta. Uppgávan hjá einum skóta er: Ger títt besta.

**- sae –**

# Ægir savnar gamlar myndir

**Svimjifelagið Ægir í Klaksvík fyllir 30 ár í januar. Fleiri av eldru svimjarunum hjá felagnum eru farnir í holt við at skipa fyri hátíðarhaldinum. Millum annað eru tey farin í holt við at savna gamlar myndir inn, sum ætlanin er skulu heingjast upp til framsýning**

HÁTÍÐARHALD
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Ein gomul mynd av svimjarum í Ægi, aftast frá vinstru: Poul Nolsøe, Mikkjal Godtfred, Sammy Isaksen, Poul Laksáfoss, Høgni Mikkelsen, Maria Brinck og Søren Djurhuus. Finngerð Sólbjørg, Jóhanna Christiansen, Helga Jacobsen, Elin Matras, Alvilda og Ella Petersen, Heini Hansen, Jógvan Ullman og Hjørleif Ellingsgaard. Bjørg Poulsen, Edmar Joensen, Hedvig Matras, Daisy Johannesen, Armgarð Weihe, Andrew Hansen og Turid Mørkøre*

**Klaksvík:**
Tann 12. januar 1975 var stovnandi aðalfundur av svimjufelagnum í Klaksvík. Fundurin var í gomlu fimleikarahøllini, har umleið 150 fólk vóru samankomin.

Poul Nolsøe beyð vælkomin og greiddi frá, hvat fyrireikingarnevndin hevði fingist við.

Nógv uppskot um nøvn vóru, men til endans var semja um, at felagið skuldi eita Ægir….

Soleiðis byrjar fyrsta gerðabókin hjá Ægi. Felagið varð bygt upp gjøgnum sjeytiárini, og hevur vunnið heilt nógv í áttatiárunum. Men seinnu árini hava úrslitini ikki verið so sannførandi, men lív er kortini í felagnum.

Og nú felagið nærkast teimum trýati í stórum, eru fleiri av teimum eldru eldsálunum farnar í gongd við at skipa fyri hátíðarhaldinum.

Millum annað vilja fyrireikararnir fegnar hava, at fólk, ið eiga gamlar myndir frá svimjikappingum ella hvat tað nú skal vera, koma í svimjihøllina við teimum.

– Hetta er fyri, at vit skulu hava so nógvar myndir sum tilber. Tað er altíð stuttligt at síggja gamlar myndir, siga tær tríggjar Elisabeth Akursmørk, Hedvig og Elin Matras. Allar tríggjar svumu sjálvar tann tíð, tað var. Um fólk hava myndir, kunnu tey bara fara í svimjihøllina við teimum.

Sjálvur føðingardagurin er 12. januar, men hátíðarhaldið verður ikki fyrr enn 22. januar. Felagið hevur bæði Skálan og svimjihøllina til tann dagin. Um dagin verður høvi hjá øllum áhugaðum at fara ein túr í føðingardag, har pinnamatur verður, og myndirnar liggja frammi.

Um kvøldið verður so veitsla fyri innbodnum umboðum úr hinum feløgum í landinum verða við. Til ta veitstluna kunnu so eisini gamlir venjarar og svimjarar kunnu tekna seg.



Leiðarin í Atlantis:

# Síggi veruleikan í eyguni

**– So leingi undirtøkan fyri mentanarligum tiltøkum í Klaksvík er so svikalig, sum hon er, haldi eg fólk illa kunnu loyva sær at vera alt ov kræsin. Og dulnevnd lesarabrøv og grenj koma í øllum førum aldrin at byggja nakað upp, sigur Høgni Klakkstein, leiðari í Mentanarhúsinum Atlantis**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*-– Var ongin biografur í Atlantis, stóð húsið eins og eitt jólatræ bert tendrað fáar dagar um árið, sigur Høgni Klakkstein, leiðari í Mentanarhúsinum Atlantis*

Seinastu tíðina hevur rættiligt kjak tikið seg upp millum lesarnar á Norðlýsinum um leiklutin hjá Atlantis sum mentanarhús í Klaksvík. Fólk fílast m.a. á, at biografurin fyllir so nógv í húsinum, at hølini eru ógegnað til konsertir, at sjónleikarafelagið ikki fær betri sømdir, og at tiltøkini sum heild ikki eru nóg fjølbroytt. Høgni Klakkstein, sum hevur verið leiðari í húsinum seinastu 6 mánaðirnar, heldur, at tað hevði bøtt munandi um støðuna, um bara fólk sum heild vístu húsinum ein betri vilja.

– Grundleggjandi trupulleikin hjá Atlantis og mentanarlívinum í Klaksvík yvirhøvur er, at undirtøkan millum fólk er so lítil. Eg fái meg illa at trúgva, at tað hvørja ferð er tiltakinum ella hølunum, tað er galið við, sigur Høgni. Hannn leggur afturat, at var undirtøkan størri, hevði tað sjálvandi verið upplagt at bygt Atlantis út við einum sali, til størri konsertir, leikir, dans o.a

### Mentanarhús – ikki sjónleikarahús

Eitt afturvendandi evni í hesum kjakinum er rætturin hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag at brúka húsið. Felagið hevur, sum er, eina avtalu við kommununa um leigu av pallinum til framførslur og kjallaranum til venjing, og tí skilur Høgni ikki rættiliga ta ónøgdina, sum javnan er at hoyra frá felagnum.

– Skal húsið virka eftir ætlan og vera fyri øll, ber tað ikki til at lata einstøk áhugafeløg seta búgv í húsinum og nýta pallin til venjingar. Pallurin í Atlantis er ætlaður teimum, sum hava verið í venjingarhøli, sigur Høgni og leggur afturat, at hann væl dugir at síggja, at umstøðurnar hjá sjónleikarafelagnum at venja ikki eru tær bestu. Tí heldur hann, at tað mátti verið upplagt, at felagið sjálvt tók stig til at finna sær eitt venjingarhøli í býnum, sum tey ótarnað kundu brúkt til venjing, pallsmíð, fundir o.a, og síðani sluppu at brúka pallin í Atlantis til sjálvar framførslurnar, eins og øll onnur.

### Snobbarí ella manglandi vitan

Atfinningarnar móti at biografurin fyllir so nógv í einum mentanarhúsið, tekur Høgni sum úttrykk fyri snobbarí ella manglandi vitan um, hvussu lítið biografurin faktiskt fyllir í mun til tað tómrúm, hann fyllir út. Var ongin biografur í Atlantis, stóð húsið eins og eitt jólatræ bert tendrað fáar dagar um árið, sigur Høgni.

– Biografurin umboðar eina fólksliga mentan, sum tað sjálvandi eisini skal vera pláss fyri. Verður pallurin í Atlantis brúktur, sum hann eigur, kunnu filmar uttan hóvasták vísast beint áðrenn ella beint aftaná eina framførslu. Hetta ger, at tað til tíðir eru ymisk tiltøk í húsinum alt kvøldið út í eitt, har fólk hittast í forhøllini á veg inn ella út - nakað ið avgjørt er við til at skapa lív og trivna í húsinum.

- So leingi undirtøkan fyri mentanarligu tiltøkunum í býnum er so svikalig, sum hon er, haldi eg tað vera lítið høpi í at fara at sortera við harðari hond ímillum, hvør skal inn, og hvør skal út. Eg havi valt at síggja veruleikan í eyguni, og heldur fáa sum frægast burturúr tí, sum er. Fyri meg snýr eitt blómandi mentanarhús seg fyrst av øllum um at skapa ein livandi stemning í einum húsi, har listafólk av ymsum slag hava lætta atgongd til pallin, og øll kenna seg væl at koma til tiltøkini. Og tað ber væl til í Atlantis, um vit øll vísa ein góðan vilja, sigur Høgni Klakkstein.

Formaðurin í Kl. Sjónleikarafelag:

# Áhugafeløgini skúgvað til viks

**– So leingi biografurin skal húsast í Atlantis, fáa hvørki vit ella nakað annað áhugafelag brúkt húsið. Tað er høvuðsorsøkin til, at Atlantis ikki virkar eftir ætlan, sigur formaðurin í Klaksvíkar Sjónleikarafelag**

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*– Tað mátti verið eyðsæð, at latið biografin farið yvir á privatar hendur, so stuðulin frá kommununi til Atlantis kundi komið áhugafeløgnum í býnum til góðar, sigur Peter J. Eliasen, formaður í Klaksvíkar Sjónleikarafelag.*

Formaðurin í Klaksvíkar Sjónleikarafelag Peter J. Eliasen vísir aftur, at felagið leggur upp til klandur við leiðsluna í Atlantis

– Men tað er rætt, at vit hava víst á okkara ónøgd við, meginparturin av teimum 500.000 kr, kommunan letur um árið til húsið, verða brúktar til at reka biograf, meðan tær livandi listagreinirnar og áhugafeløg annars mugu víkja. Tað er ikki í tráð við samtyktirnar fyri Atlantis, og tí virkar húsið heldur ikki eftir ætlan, sigur Peter

### Fáa ikki vant

Klaksvíkar Sjónleikarafelag hevur ferð eftir ferð víst á, at síðani biografur byrjaði í Atlantis, eru umstøðurnar hjá felagnum at venja bara versnaðar.

– Hvørki eg ella felagið hava nakað ímóti biografinum í sær sjálvum. Trupulleikin er bara, at onki kann vera aðrastaðni í húsinum, meðan filmar verða vístir, tí dunið úr hátalarnum doyvir alt annað, sigur Peter. Sum er, verða filmar vanliga vístir fimm dagar um vikuna, oftast tvær ferðir um dagin, har fyrra sýningin byrjar kl. 20 og tann seinna kl. 22. Hetta er sama sama tíðarbil, sum sjónleikarafelagið plagar at venja, og mugu tey tískil bróta venjingarnar av og taka tær uppaftur, tá filmarnir eru lidnir.

– Høvdu vit havt møguleika at vant um dagin, hevði tað bøtt um støðuna, men vit er eitt áhugafelag, har fólk jú eru til arbeiðis um dagin, sigur Peter og vísur á, at tað nærum er vónleyst hjá leikarnum at konsentrera seg um venjingina, tá leikstjórin ferð eftir ferð knappliga má steðga øllum og biðja tey koma aftur eini tríggjar tímar seinni. Tað er ongi ivi um, at hetta skaðar trivnaðin og samanhaldið millum limirnar í felagnum, sigur Peter, sum ivast í hvussu leingi eitt áhugafelag kann liva undur slíkum umstøðum, áðrenn limirnir geva skarvin yvir.

### Onnur feløg eisini

Peter dugir ikki at síggja tað rímiliga í, at biðja sjónleikarafelagið fara út í býin at leiga sær venjingarhøli. Felagið hevur, longu sum er, brúkt nógvan pening til at umvæla og innrætta Atlantis, júst fyri at umstøðurnar at venja og spæla sjónleik skuldu verða av teimum bestu.

– Tí mátti tað eftir mínum tykki verið léttari at funnið eitt annað høli til at vísa filmar enn til at spæla sjónleik. Tað hevði eisini givið øðrum áhugafeløgum í býnum møguleika at brúkt húsið, tí tað er jú ikki bara sjónleikarfelagið, sum ikki fær verið har ta tíðina, húsið skal brúkast til biograf, sigur formaðurin í Klaksvíkar Sjónleikarafelag.